# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Almenn heilsutiltøk

Í hesum døgum verður skipað fyri útiviku kring landið. Tað er Fólkaheilsuráðið, sum hevur tikið stig til hetta avbera góða heilsutiltakið. Fólk verða biðin um at seta bilin og ganga til og frá arbeiði. Kring landið alt síggja vit avleiðingarnar av hesi heilsuligu áheitan. Bilarnir síggjast ikki so væl í landslagnum, meðan fólk í stórum tali síggjast til gongu ella á súklu. Hugflogið verður so eisini tambað, og kring landið skipa tey fyri alternativum rørslutiltøkum, sum øll hava til endamál at fáa fólk at taka heilsuna í álvara – í hesum høpi tað at røra seg so ella so sum liður í altjóða rørsluárinum 2009.

Fólkaheilsuráðið er ein stovnur, sum átti at fingið nógv størri raðfesting í føroyska samfelagnum – í okkara hugaheimi, í okkara gerandisdegi. Hann eigur at vera so nógv frammi og so sjónligur, at fólk við tíðini fara at meta hann sum eina veruliga týdningarmikla institutión í samfelagnum – eitt afturvendandi og blívandi tiltak, sum er eins týdningarmikið sum so nógv annað í samfelagnum, ið vit ikki halda okkum kunnu vera fyriuttan.

Tað hevur eisini verið ein frægd at sæð og hoyrt landsins ovasta leiðara á heilsuøkinum, landsstýrismannin Hans Paula Strøm ganga á odda í herferðini fyri at fáa fólk at taka heilsuspurningar í størri álvara. Hann hevur veruliga megnað at liva upp til hugtakið um at standa á barrikadunum – heilsubarrikadunum. Og tað eigur hann rós uppiborið fyri. Tí nettupp hetta at skula hava ábyrgdina av stórum parti av okkara heilsuverki krevur eisini, at tú sjálvur vísir í verki tað tú krevur ella ynskir av øðrum. Í so máta má sigast, at heilsumálaráðharrin hevur megnað at gera orð til verk, at fáa teori at blíva til praksis. Her hevur verið rópt varskó og víst hevur verið á nýggjar betri gongdar leiðir, tá tað um heilsuna ræður. Vit skulu eta meira grønt og frukt. Vit skulu ansa eftir ikki at eta ov nógv feitt. Vit skulu vera varin við sukuri. Vit skulu røra okkum. Vit skulu gevast at roykja ella vanda okkum um roykingina, og vit skulu duga at brúka rúsdrekka, soleiðis at tað nervar heilsustøðu okkara minst møguligt. Og soleiðis kundi verið hildið fram. Heilsumálaráðharrin og fólkini rundan um hann og stovnar undir honum hava veruliga gjørt vart við seg. Og tað eru mong fólk, ið eisini royna at gera vart við hesi viðurskifti. Í gjár var áhugaverd tíðargrein í blaðnum, har lesandi føroyingur innan heilsuøkið kemur við góðum ráðum.

At gera eina góða heilsu til sítt herróp er kanska nútíðarinnar størsta og besta mál – eins týðandi sum tá vit tosa um at steðga dálking og troyta varandi orkukeldur – eins týdningarmikið sum at fara væl um okkara tilfeingi, fiskastovnarnar. At hava eitt stýri, at hava stýrandi menn og kvinnur, sum prædika sunna heilsu, tað fara vit ongantíð skeiv av. Tað skal vera okkara vón, at øll fólkavald tað veri seg í kommunustýrum ella á løgtingi lata seg fáa íblástur frá teimum, fakfólki, granskarum, politikarum oø., sum hava vilja og dirvi til at ganga undan fyri einum heilsugóðum Føroyum. Gott í tykkum.

**Sosialurin**

## Lokala stríðið má steðga

**HELGI ABRAHAMSEN**
løgtingsmaður



Onkuntíð tá eg havi skrivað eina blaðgrein, kann eg undrast yvir, hvussu ymiskt fólk uppfata tað, ið skrivað varð.

Fyri nøkrum vikum síðani skrivaði eg eina grein, har eg vísti á nakrar vansar við føroyska búsetingarmynstrinum. Greinin fekk nógvar viðmerkingar á kjaksíðunum hjá Norðlýsinum og Vágaportalinum.

Fyrstur at gera viðmerking var John William Joensen, formaður í Norðoya Sambandsfelag, sum segði seg vera skelkaðan og hava mist lívsmótið eftir at hava lisið greinina, millum annað tí at eg skal hava fegnast um, at bygdarlívið er blivið fátækari. Sjálvandi fegnist eg ikki um eitt fátakt bygdalív, men eg má bara konstatera, at fólk vilja ikki búgva á smáplássunum. Tað er fakta!

Eg mæli ikki til at reka fólk úr bygdunum, men eg kenni meg sannførdan um, at vit megna ikki at veita teimum tær tænastur, sum eitt nútíðarmenniskja krevur. Tí flyta tey sjálvboðin.

### Politivaktir og læknavaktir

John William er skuffaður um, at eg ikki havi sett meg inn í málini um politivaktir og læknavaktir (eg gangi út frá, at hann meinar við politivaktirnar og læknavaktirnar í Klaksvík, sum kjakast hevur verið um, ta seinastu tíðina).

Tað er rætt, at eg nevndi politivaktir og læknavaktir, men tað var bara generelt og var ikki meint sum viðmerking til nakað ítøkiligt mál. Men eg kundi kanska spælt bóltin yvir aftur til John William og spurt, hvat hann heldur um til dømis politi- og læknavaktir í Fugloy ella í Mykinesi? Hví er ikki ein kommunulækni og ein politistøð á hvørjari útoyggj í Føroyum? Er tað tí, at tey ikki hava brúk fyri hesum tænastum, ella er tað tí, at vit ásanna, at fólkagrundarlagið á hesum plássunum er ov veikt?

Og so gera vit eitt kompromi. Vit lata fólk búgva har, men vit veita teimum ikki hesar tænastur, sum vit annars sig vera lívsneyðugar. Er tað nøktandi? Ella hava vit nakran annan møguleika? Umleið helvtin av kommunulæknastørvunum í Føroyum eru longu ómannað, tí vit mangla læknar. Skulu vit so senda hesar fáu kommunulæknarnar út á útoyggjarnar og lata læknatørvin á stórplássunum verða uppaftur størri enn hann er í dag? Nei tað kunnu vit ikki, - men hinvegin, so er tað eisini ábyrgdarleyst at lata eina heila oyggj liggja í læknaloysi.

Sjálvandi skal almenna tænastustøðið vera so høgt sum gjørligt, men vit mugu vera realistisk. Tá vit ikki fáa nóg mikið av læknum, so mugu vit royna at fáa sum mest burturúr teimum, sum vit hava, og tað gera vit ikki við at avmarka teirra starvsøki til støð, har sera fáir sjúklingar eru.

### Klaksvík verður ikki ein útjaðari

Hvat Klaksvík viðvíkur, so nevndi eg júst Klaksvík sum eitt av økjunum, har føroyingar í framtíðini fara at búleikast. Eg kenni meg sannførdan um, at verður Skálafjarðartunnilin gjørdur, so fer nógv tann størsti parturin av føroyingum í framtíðini at búgva í økinum Tórshavn, Skálafjørður og Klaksvík og bygdunum sum liggja uppat hesum økinum. Harvið er ikki sagt, at alt annað verður avtoftað.

### Føroyar eru eitt lítil land

Sjálvur havi eg seinastu tíggju árini, ferðast dagliga ímillum Skálafjørðin og Havnina, og helst hevur hetta ávirkað meg, soleiðis at eg als ikki dugi at síggja, at til dømis Eysturoyggin skal vera ein útjaðari. Eg seti meg í bussin hvønn morgun og ein góðan tíma seinni eri eg á arbeiðsplássinum í Havn. Hvar aðrastaðni í verðini brúka fólk minni enn ein tíma at koma til og frá arbeiði? Og so brúka vit tíð og orku til at kjakast um, hvar til dømis flogvøllurin skal vera. Sørvágur er minni enn ein tíma frá miðbýnum í Havn (í altjóðahøpi er hetta beint uttanfyri høvuðsstaðin) – hetta sama argumentið kann sjálvsagt eisini brúkast tann øvugta vegin.

Vit mugu læra at síggja, at vit eru eitt lítið lokalsamfelag úti í Atlantshavinum og skulu vit brúka tíð og orku – fyri ikki at tala um pengar, til at kríggjast ímóti hvørjum øðrum, og skulu vit hava eitt ótal av dupultfunktiónum, bara tí at vit ikki kunnu semjast um, hvar ein stovnur skal vera, so tapa vit stríðið um at yvirliva sum land og tjóð.

Vit brúka í tonsavís av brennievni til at flyta okkum aftur og fram eftir longum vegastrekkjum, tí vit hava eitt bústaðarmynstur, sum als ikki hóskar til krøvini, sum eitt nútíðarsamfelag setur. Vit kundu spart nógvar pengar við at broytt hetta, og tí spyrji eg: Hava vit ráð at lata vera? Men vit gera tað øvugta. Vit brúka pengar til at halda lív í einum gomlum bústaðarmynstri, sum ger tað ómøguligt at veita borgarunum tær mest neyðugu tænasturnar.

Eg sigi ikki, at vit skulu brúka tíð og orku til at avtofta bygdir, men vit eiga heldur ikki at brúka tíð og orku til at forða fólki í at búseta seg har, sum tey sjálvi ynskja at búgva - millum annað tí at tað er praktiskt og trygt.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.